# Stutt viðmerking til Lisbeth

JÓANNES EIDESGAARD
løgmaður



Eg ætlaði mær als ikki at leggja fyri í nýggja árinum í einum orðadrátti í bløðunum við mínar egnu samgongufelagar, men viðmerkingin hjá serliga Lisbeth L. Petersen, men eisini frá øðrum m. a. mínum egnu floksfeløgum ger, at eg meti, tað er neyðugt at koma við eini rættleiðing um mín leiklut í samband við fíggjarlógina fyri 2007.

Í samband við álitið frá meirilutanum í fíggjarnevndini til fíggjarlógina fyri 2007 var eg tvær ferðir í viku 51 á fundi við meirilutan í fíggjarnevndini.

Á fyrra fundinum fekk eg at vita, at í uppskotinum frá meirilutanum stóðu 5,2 mió. kr. til LV fyri rakstur av undirsjóvartunlunum - sjálvandi við tí greiða endamáli, at kostnaðurin fyri at koyra ígjøgnum skuldi lækka. Tað gekk greitt fram á tí fundinum, at uppskotsstillarin var Anfinn Kallsberg, men ikki sum ein minniluti, men sum partur av meirilutanum. Tá gjørdi eg vart við, at vit heldur áttu at tikið samlaða ferðakostnaðarmálið upp sum eina heild t. v. s. eisini umfatandi skipini hjá SL, soleiðis at vit kundu komið við einum prísreformi við lækkaðum gjøldum til várs fyri undirsjóvartunlar og ferjur við gildi frá t. d. 1. mai.

Seinnu ferð, eg var á fundi við meirilutan, var sama morgun, sum onnur viðgerð var. Tá boðaði eg frá, at um raksturin av undirsjóvartunlunum framvegis var við í meirilutaálitinum, so fór eitt broytingaruppskot at koma, sum kom at skjóta upp, at á leið sama upphædd var latin í SL, so kostnaðurin av ferðaseðlum við Strandferðsluni eisini kundi lækkast. Sjálvandi fór eitt slíkt uppskot at koma – alt annað vildi verið løgið. Tað høvdu tingmenn eisini boðað mær frá. Og tað kom so eisini.

Tá Lisbeth sigur, at eg skuldi sligið nevan í borðið og tikið málið úr hondunum á fíggjarnevndini, so skal eg bara siga, at tað hevði eg als ongar ætlanir um. Málið lá hjá tykkum, og um eg blandaði meg meira, enn eg gjørdi, so hevði eg ivaleyst hoyrt fyri tað frá øllum í nevndini. Málið lá uttan fyri mítt mandat, Lisbeth. Tit fýra í meirilutanum eru okkara talirør og umboð.

Mítt point er, at eingin kann lumpa ella lirka eina játtan í eitt álit. Álitið var álitið frá meirilutanum, har Sambandsflokkurin eigur tvey umboð, Javnaðarflokkurin eitt umboð og Fólkaflokkurin eitt umboð. Var uppskotið viðvíkjandi undirsjóvartunlunum bert frá einum nevndarlimi, hevði verið talan um eitt minnilutaálit. Men tit handaðu Løgtinginum eitt meirilutaálit, sum tit øll fýra høvdu undirskrivað og harvið góðtikið. Seinni samtykti løgtingið tykkara uppskot og broytingaruppskot – longri er tann søgan ikki.

Annars skal eg geva Henrik Old rætt í, at loysnin við lækkaðum gjøldum fyri ferðing gjøgnum tunlar og við ferjum sjálvandi kemur at venda rætta vegin.

MARITIMT PERSONELL?

OCEANWIDE



Islandsk sproget kontor sekretær søges til Oceanwide i Tórshavn

Oceanwide er et DNV certificeret bemandings agentur, specialiseret i rekruttering, ansættelse og udlejning af maritimt, offshore og landbaseret personale.

Oceanwide opererer med et netværk af fuldt ejede afdelingskontorer i Holland, Norge, Danmark, Færøerne, Australien, Cypern, Tyskland, Myanmar, Singapore, Polen, Ukraine, Rusland, Baltikum og USA samt et bredt netværk af agenter verden over. Oceanwide er et datterselskab af Humares Group, et ledende bemandings agentur for teknisk og maritimt personale med en årlig omsætning på 100 millioner EURO.

Vi søger til omgående tiltrædelse en islandsk talende kontordame/kontor sekretær til vores kontor i Tórshavn.

**Krav:**
Erfaring med fiskeri og søfart er ikke et krav men klart en fordel.
Det forventes at du er kontoruddannet og har godt kendskab til Office-pakken (Outlook, Word, Excel).
Det forventes at du snakker/læser/skriver færøsk, islandsk og engelsk.

**Dine arbejdsopgaver:**
Du vil få almindelige kontoropgaver på vores kontor i Tórshavn.
Arrangere arbejds- og opholdstilladelser for personale til Færøerne og Island, opdatere personaledatabasen (arkivere og registrere ansøgninger), arrangere rejser til personale m.m.

**Løn:**
Efter kvalifikationer

**Ansøgning:**
Venligst send ansøgning til faroe@oceanwidecrew.com eller ring på +298 323111

www.oceanwidecrew.com

Oceanwide er et datterselskap av Humares Gruppen

OCEANWIDE

WE GUARANTEE OPTIMAL CREW SERVICES

TOYOTA reservedele

Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.

**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**

DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk

Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug

ISO 9001 certificeret

DAG Dansk Autogenbrug - vi skåner miljø og økonomi

Autoophuggernes DATALAGER DK

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum



Blaðfólk

Á redaktión okkara er spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini í Vágsbotni. Harumframt er ynskiligt, at viðkomandi eisini røkir aðrar uppgávur kring landið.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum um 1. februar, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Við rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um at skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært avtalu millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, blaðstjóra, á tlf. 341800. Ella við at senda teldupost á jan@sosialurin.fo

Seinasta freist at søkja starvið er 22. januar 2007, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.